# BØNARLØTAN

**JUNI, JULI, AUGUST 2024 39. árg.**

***1. dagur*** ***Matt. 12.1-14, Matt. 16.1-12, Dán. 6.1-14***



**FRANKARÍKI, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen**
**Sarah 13, Leah 10, Abigail 5**

Tað var signað at vitja familju, vinir, samkomur, skúlar og útvarpsstøð í Føroyum. Jóhannis er byrjaður í fulltíðartænastu at stovna nýggja samkomu. Vit bjóða fólki úr grannalagnum til grill fyri at skapa vinalag. Vit eru spent at síggja, hvat Gud fer at gera!

**Anna og Hans Djurhuus**

Føroyskt møti verður leygard. 1. juni kl. 19 í Bethaniakirkjuni, Dag Hammarskjøldsgade 2A í Aalborg. 15. juni luttaka vit á føroyska møtinum í Give Baptistkirke kl. 19. Biðið at okkum verða givin orð at tala loyndarmál Kristusar.

**KRINGVARPIÐ**
2. juni kl. 17 útvarpsmøti, Lívdin, Hoyvík
4. aug. kl. 17 útvarpsmøti, Elim, Søldarfj.

**EVANGELISKA RØDDIN á ras2.fo (meir á www.evr.fo)**
Sunnukv. kl. 21.00....... Kelduvaðið (endursent hóskv. kl. 21)
Týskv. kl. 21.00........... Á torginum (endursent sunnud. kl. 12.30)

*1. aug. fyllir Andreas Nónstein 15 ár

***2. dagur*** ***Es. 51.1-23, Es. 64.1-11, Sálm. 1 og 2***

**DANMARK, Kristnastova**
**Sólva og Jákup Hansen**
Hervør og Kári á Torkilsheyggi við familju, og síðani Marin og Kári Østerø, avloysa okkum í Kristnastovu, meðan vit eru í Føroyum 1. juli - 12. aug. Biðið Harran signa tey í tænastuni.

**Susan og Øssur Berghamar**



Tey lesandi eru í summarfrí, og eingin fríggjakvøldssamkoma er. Møti er hvønn sunnud. kl. 11, har ferðandi kunnu savnast kortini. Tað eru vit fegin um. Hildið verður eisini á við andaktunum á Sjúklingahotellinum gjøgnum summarið. Takk fyri áhaldandi samfelag og forbøn!
berghamar@kristnastova.dk

***3. dagur*** ***Matt. 12.15-32, Matt.16. 13-28, Ef. 6.1-24***

**ITALIA, Molise**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Trisha 12, Emma 8**
Í juni skipar samkoman fyri barnatiltaki. Vit vænta, at flestu

børnini í økinum koma. Í juli fara børnini í samkomuni á ymsar summarlegur. Í aug. skipa vit aftur fyri Parola. Vit gleða okkum at fáa spentar, ungar føroyingar hendan vegin at brúka eina intensa viku í Bíbliuni. Seinni í aug. liggur leiðin til Skotlands á stevnu og síðani til USA at vitja brøðurnar hjá Heidi.

**USA, Nebraska, Ethnos 360**
**Rachel og Peter Hansen**
17. mai - 8. juni verður Rachel í Týsklandi at hjálpa Natalie og Philip við tvíburunum. 10-30. juli vitja Wina, Benjamin og Noah. Trúboðarar ferðast mest um summarið í skúlafrítíðini. Biðið, at tey, sum fara í farloyvi, venda styrkt aftur til markirnar.

**ZAREPTA**
Átta summarlegur frá 23. juni - 11. aug., 18 ár og eldri 16-18. aug., familjulega fyri børn við breki 22-25. aug., bíbliuskeið 26. aug. - 1. sept. Tørvur er á hjálparfólki.




***4. dagur*** ***Es. 52.1-15, Es. 65.1-25, Dán. 6.15-29***

**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Victoria 18, Emma Grace 16, Jónatan 14, Markus 12, Evita 9, Joy 7**
Vit verða í USA í juni á legum og at halda frí, og í juli verða barna- og ungdómslegurnar á Campamento Berea. Biðið fyri samkomuni í Puruándiro, at nógv ung velja at fylgja Jesusi, og fyri Isabel og Edy, elstu dóttrini og manninum, sum eru flutt til Ciudad Hidalgo, meðan Michael og Sophia Clark eru burtur. Tey taka sær av lítlu, nýggju samkomuni har og hava evangeliskar bíbliutímar úti í seks ymiskum heimum.

**FØROYAR**
**– Else og Poul Johan Djurhuus**
**– Anna Maria og Rógvi Joensen**
**– Khuldah og Sámal Mikkelsen, Josva 14, Ester 13, Samuel 9**
**– Dora og Niels Pauli Nónstein, Andreas 15, Kristina 13**
**– Danjal og Synnøve av Rana, Anna Emilie 9, Lukas 4**

## *5. dagur* — *Matt. 12.33-50, Sálm. 146, Róm. 1.1-15*



**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**
Nógv tiltøk verða her á Calvary í summar: summarbíbliuskúlin VBS, tvær tónleikalegur umframt onnur serlig tiltøk. Í aug. hava vit gullbrúdleyp og verða burturstødd allan mánaðin. Vit hava nógv at takka Harranum fyri!

**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**
**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**
Biðið, at Gud signar Ástjørn í summar og sendir bæði børn og ung umframt starvsfólk og annað. *Gud er mentur at lata alla náði lutast ... ríkliga.* (2. Kor. 9,8)

*5. aug. fyllir Karis Flanagan 11 ár

## *6. dagur* — *Es. 53.1-12, Matt. 17.1-13, Dán. 7.1-14*

**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**
Vit rættlesa nú Matt. ev. og viðgera broytingaruppskotini frá

umsetingarráðgevanum, og vónandi verður nakað av Skriftini útgivið.



**USA, New Tribes Mission, Alabama**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**

Í summar vitja vit fleiri samkomur í USA og venjingarskúlan, sum NTM hevur í Missouri.

***7. dagur Sálm. 141 og 142, Es. 66.1-11, Róm. 1.16-32***

**SENEGAL, Dakar**
**Marion og Hans Arni Jensen**
**Ryan 15**

Vit vitja samkomur, meðan vit eru í Føroyum 7. juni - 10. juli. Vit verða í USA 11. juli - 11. aug. saman við foreldrunum hjá Marion og børnum okkara, sum vit ikki hava sæð leingi. Vit verða aftur í Dakar 12. aug., tá ið Ryan skal aftur í skúla. Hans Arni arbeiðir á skrivstovuni og Marion við málráðgeving. Hetta er stundum tungt – biðið, at Harrin sendir fleiri út.



**PAPUA NÝGUINEA, Sorimi (fj.arb.)**
**Carol og Poul Joensen**

Vit prenta Nýggja Testamenti í summar, soleiðis at samkoman í Sorimi fær NT á sínum egna máli. Biðið fyri hesum og fyri næmingunum, ið gerast lidnir her á skúlanum, og um vegleiðing, tá ið teir skulu fara víðari í lívinum.

## *8. dagur* *Matt. 13.1-17, Matt. 17.14-27, Dán. 7.15-28*

**FØROYAR**
**Shamila og Høgni Johannesen**

Um 150 hava luttikið á STEVN í tveir mánaðir. Biðið um vísdóm at fylgja arbeiðnum upp. Komandi ferðin til Pakistan er útsett fleiri ferðir vegna avbjóðingar at fyrireika. Biðið fyri familjuni hjá Shamilu og teirra ætlanum í landinum, sum eisini ávirka okkara arbeiði har.

**OM, SUÐURAFRIKA**
**Tanja og Kurt Abrahams**
**Hanna 0**

Eftir at hava tænt í AIDS Hope í fleiri ár fara vit av ymsum orsøkum í aðra tænastu hjá OM í Suðurafrika. Okkum tørvar vísdóm og biðja um Harrans leiðslu. Takk fyri áhaldandi forbøn og stuðul.




## *9. dagur* *Es. 54.1-17, Es. 66.12-24, Sálm. 3 og 4*

**DANMARK, Skovlunde**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Lydia 7**

Vit hava nú tænt í Skovlunde Frikirke í 11 ár og kenna Guds trúfesti gjøgnum alt. Vit vitja í Føroyum í sept. í sambandi við mans- og kvinnustevnu á Zarepta. Nóah fylti 18 í mai, og Lydia er nú 7 ára gomul og trívist á Thomasskúlanum.



*9. juli fyllir Elliot Poulsen 8 ár

## *10. dagur* *Matt. 13.18-30, Matt.. 18.1-11, Róm. 2.1-16*

**DANMARK**
**Glostrup Frikirke**
Alt summarið hava vit sum vant breyðbróting sunnudag kl. 11 og møti kl. 12 Aftaná er kaffi og hugnalig samvera. Verið hjartaliga vælkomin.



**NTM - FØROYAR**
**Noomi og Eli Christiansen**
**Hadassa 13, Tabita 10, Debora 8,**
**Natan 5**

## *11. dagur* *Es. 55.1-13, Dán. 1.1-21, Dán. 8.1-14*

**DANMARK, Kolding**
**Anne og Jan Zachariassen**
Jóhannes ev. verður liðugt umsett í summar. Eftir 40 ár er USA einasta landið, sum hevur alla Bíbliuna umsetta til teknmál. Vit savnast sum deyvasamkoma í Vejle.

**DANMARK, Odense**
**Árni Helmsdal**
Føroyska arbeiðið fer í summarfrí í juni, men verkið á gøtuni heldur fram. Biðið um vísdóm og náði at møta nógvum ferðafólki - ikki minst úr Kina - her í Odense, og at vit vísa á Jesus.

## *12. dagur* *Matt. 13.31-43, Sálm. 147, Róm. 2.17-29*

**TURKALAND, Istanbul**
**Annika og Stephen Everett**
Minnist bæði turkisk og útlendsk evangeliserings- og bønartoymi, ið fara til ónádd øki í Turkalandi í summar. Nú er torførari at fáa

visa orsakað av herdum krøvum frá stjórnini. Biðið, at Harrin opinberar seg fyri turkum, nú sláturhøgtíðin er mitt í juni. Vit gleða okkum at koma stuttan túr til Føroya í juli – fyrsti túrur í tvey ár.

## *13. dagur* *Es. 56.1-12, Matt. 18.12-22, Dán. 8.15-27*



**GRØNLAND, Qaqortoq**
**Marjun og Páll Poulsen**
Vit takka Harranum fyri øll starvsfólkini til legurnar í summar. Eisini fyri øll, ið hava stríðst og kýtt seg, so Juvel kundi blíva liðugt umvældur og royndarsigldur, og HA fyri undantaksloyvi at hiva bátin umborð á Sandfrakt. Biðið, at Harrin heldur Sína góðu hond yvir legunum á allan hátt, og at vit fáa náði, vísdóm og kraft til at bera evangeliið fram einfalt, greitt og við kærleika.

**Juvel II**
**Gull-Britt og Karsten Hansen**

## *14. dagur* *Sálm. 143, Dán. 2.1-23, Róm. 3.1-20*



**GRØNLAND, Nuuk**
**Naalakkap Jiisusip Oqaluffa**
**Hans Sivertsen**
Juvel II stuðlaði okkum við møtum í salinum og vitjanum í fongslinum og á ellisheimum. Vit fara út frá samkomuni at hava 3 legur í Ameralikfirðinum og 3 dagar við Outreach. Enn mangla nakrir kvinnuligir leiðarar og nøkur at týða boðskapin til grønlendskt.

**GRØNLAND, Qasigiannguit**
**Solveig og Daniel Kinda**

| *15. dagur* | *Matt. 13.44-58, Matt. 18.23-35, Dán. 9.1-14* |
|---|---|

**DANMARK, Hirtshals, Malta**
**Ansa og Arnold Mortensen**
**Ewelina 14**
Ansa hevur tað væl betri nú. Vit vænta nógvar gestir í summar. Biðið um vísdóm og styrki til uppgávuna. Biðið eisini fyri teimum ungu, ið koma á ungdómsmøti, at tey taka ímóti Harranum.

**FØROYAR**
**– Elin og Jógvan Jacobsen**
**– Unn og Jógvan Zachariassen**
**– Lis Zachariassen**
**– Annika og Poul Færø**
**– Anna og Óli Steinberg**
**– Maria og Jens Bech**



*15. juni fylla Micah og Ruben Magura 11 ár
*15. aug. fyllir Victoria Tuohy 18 ár

| *16. dagur* | *Es. 57.1-21, Dán. 2.24-49, Sálm. 5* |
|---|---|

**ONGLAND, Cornwall**
**Anna og David Rodda**
Hóast 77 og 69 ára gomul megna vit enn at tæna Jesusi í smærri lutum. Vit takka fyri stuðul tykkara og eisini fyri at kunna lata gávur víðari til Pastor Musa, Augustin og verkið at røkka saafi fólkinum við evangeliinum. Biðið fyri Augustin og arbeiðnum at prenta Skriftirnar á saafi við bæði rómverskum og arabiskum stavum.

*16. juni fyllir Lukas av Rana 4 ár
*16. juni fyllir Emma Guttesen 8 ár

## *17. dagur* *Matt. 14.1-12, Ef. 1 1-23, Róm. 3.21-31*

**ÍRLAND, Global Serve International**
**Guðrun og Ivor Tutty**
Vit hava summarlegu fyri børn síðst í juli, har eisini Guðrun hjálpir til. Í fjør vóru 100 børn á legu, og vit vænta enn fleiri í ár. Biðið fyri fyrireikingum og leiðarum, og at sáðið ber ávøkst. Ivor er upptikin við útbygging av salinum.

## *18. dagur* *Es. 58.1-14, Dán. 3.1-18, Dán. 9.15-27*

**SVEIS, Versoix, Redeemer Grace**
**Jeanette og Solomon Magura**
**Reuben 11, Micah 11**
Biðið fyri teimum átta, ið gera seg til reiðar at doypast. Vit takka Harranum fyri tey. Biðið eisini fyri møtunum ígjøgnum summarið.

## *19. dagur* *Matt. 14.13-21, Sálm. 148, Róm. 4.1-25*

**ONGLAND, Birmingham, OM**
**Claire og Craig Niclasen**
**Rebekah 16, Lydia 14**
Í summar hjálpir Claire nýggjum trúboðarum við at útvega sær stuðul. Eisini luttekur hon á TeenStreet í Bretlandi. Harrin hevur hjálpt gjøgnum árið. Biðið um hvíld og endurnýggjan.



## *20. dagur* *Es. 59.1-21, Ef. 2.1-22, Dán. 10.1-11.1*



**PAPUA NÝGUINEA, Kovol**
**Natalie og Philip Hansen**
**Louis 7, Timon 5, Manuel 0, Salome 0**

Áðrenn vit fara aftur til PNG í sept., verða hús okkara í Kovol bygd út, so pláss verður fyri tvíburunum. Sjálvboðin hjálpa okkum at undirvísa eldru børnunum heima og við tvíburunum komandi hálvtannað árið. Hetta fer at geva Natalie møguleika at gera seg lidna at læra kovol málið og verða meira virkin í tænastuni.

## *21. dagur* *Sálm. 144, Dán. 3.19-30, Róm. 5.1-21*

**INDONESIA**
**Krissy og Daniel Hansen**
**Zephaniah 3, Selah Rose 1**

Vit arbeiða nú í asmat ættarbólkinum. Her læra vit mál og mentan, at laga okkum til nýtt stað og fólk, og hvussu alt gerandisligt skal leggjast til rættis. Um juli/aug. verður ráðstevna fyri øllum NTM trúboðarum her í Papua, Indonesia. Biðið um eggjan og endurnýggjan fyri øll. Eitt toymi úr USA kemur í juni at hjálpa starvsfeløgum okkara at byggja hús og við øðrum verkætlanum í ættarbólkinum.

**Elam Ministries, Evropa**
**Margretha Højgaard Poulsen**

## *22. dagur* *Matt. 14.22-36, Ef. 3.1-21, Dán. 11.2-14*

**ONGLAND, European Christian Mission**
**Dorit og Simon Marshall**

Fleiri vilja fegin nú bera gleðiboðskapin út í Evropa, og samkoma

Harrans veksur fram á nýggjum støðum. Í juni flyta foreldrini hjá Simon í eldraíbúð nær við hjá okkum. Vit vóna, at tey falla væl til her í Taunton, og at vit verða teimum bæði hjálp og stuðul.

## *23. dagur* *Es. 60.1-22, Dán. 4.1-18, Sálm. 6*

**TÝSKLAND, Hückeswagen, Ethnos 360**
**Wina og Benjamin Hansen**
**Noah Elias 12**

Síðstu viku í juni hava vit kunningartiltak fyri trúboðarar, ið fara í stutttíðartænastu komandi ár. Vit fara til USA tríggjar vikur í juli at vitja samkomuna og familju.



**FILIPSOYGGJAR, Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**

## *24. dagur* *Matt. 15.1-12, Ef. 4.1-16, Róm. 6.1-23*

**PAPUA NÝGUINEA, Mengen**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 16, Noah 15, Karis 11, Judah 9, Ethan 6**

Biðið, at Noah kemur seg skjótt eftir skurðviðgerðina 15. mai, og at hoyrnin batnar. Biðið eisini um opnar dyr fyri evangeliinum í Mengen bygdunum, ið liggja nær Lele samkomuni, fyri skúlagongdini hjá Noah og Nya í Lapilo komandi ár, og at Gud útvegar fígging til heilsuútreiðslur og ferðaseðlar fyri okkum øll til PNG í juli.

**PAPUA NÝGUNEA**
**Lili og Brian Poulsen**
**Elliot 8, Jude 5, Evelyn 4, Olivia 0**

*24. aug. fyllir Louis Hansen 7 ár

## *25. dagur* *Es. 61.1-11, Dán. 4.19-37, Dán. 11.15-28*

**FØROYAR**

**Vanja og Svein í Prestgarði, Svend 15, Terji 12, Petra 10**



Børnini Jenny og Svend eru liðug við skúlan. Vit fara á útimøtiferð til Skúvoyar og onnur støð í Føroyum – kanska eisini til Danmarkar. Í Noregi eru vit partur av tjaldmissiónini Vekkelsesteltet, har Mona (dóttir Aril Edvardsen) og maður hennara, Per Harry, skipa fyri. Møtini verða í Sarons Dal og Søgne saman við Arthur Robertsen.



**Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**

Biðið fyri bíbliuskeiðnum 26. aug. - 1. sept. Tekning er frá 1. aug. hjá Giddu Vang, tel. 265390. Takk fyri forbøn og stuðul. *Tí góður er Harrin; náði Hansara varir til ævigar tíðir, trúfesti Hansara mann eftir mann.* (Sálm. 100.5)

**– Birgit og Svenning av Lofti**

**– Rutt og John í Skemmuni**

## *26. dagur* *Matt. 15.13-28, Sálm. 149 og 150, Róm. 7.1-25*

**OM, LOGOS HOPE, TeenStreet**

TeenStreet verður 26. juli - 2. aug. Síðani fara 9 ung til Póllands á missiónsferð at hjálpa ukrainskum flóttafólkum har. Biðið, at fleiri ung fara á bíbliu- og missiónsskúlar í heyst. Í løtuni er eingin føroyingur fast umborð á skipunum hjá OM.

## *27. dagur* *1. Kor. 6.1-20, Ef. 4.17-32, Dán. 11.29-45*

**SENEGAL, Tongia**
**Lív Poulsen**



Umsetingarráðgevin kemur um miðjan juni at kanna 2. Mós. Vit halda fram at rættlesa Nýggja Testamenti. Eg eri eisini byrjað at gjøgnumganga kladduna til Dóm., sum ungi umsetarin arbeiðir við. Biðið, at vit í regntíðini fáa nóg mikið av regni við jøvnum millumbilum. Her er sera heitt og kvalið. Biðið um góða heilsu og signing.

**VENESUELA, Puerto Ordaz**
**Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen**

## *28. dagur* *Sálm. 145, Dán. 5.1-12, Róm. 8.1-17*

**FILIPSOYGGJAR, Nayba, NTM**
**Liz og Ragnar Niclasen**




Eftir at hava rættlisið fyrru helvt av Rómbr. í vetur, fara vit aftur til Kanada fyri summarið, har vit halda fram at fyrireika restina av tilfarinum. Í sept. rættlesa vit tilfarið og gjøgnumganga alt Rómbr. saman við monnunum, sum eg arbeiði saman við, fyri síðani at gjøgnumganga tilfarið í størri høpi. Soleiðis fáa fleiri samkomur hjálp og høvi at læra um Rómbr.

**FILIPSOYGGJAR, Naplud (f)**
**Monika og Tim Sharp**
**Hanna 16**

## *29. dagur* *Matt. 15.29-39, Ef. 5.1-16, Dán. 12.1-13*

**TEILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen**
**Aron 12, Noah Kristian 10**
Um Harrin vil, so fara vit aftur til Tailands í juli. Biðið framhaldandi um, at Eli fellur væl til í Hollandi, og at hann finnur eitt hóskandi stað at búgva.

*29. juli fyllir Timon Hansen 5 ár

## *30. dagur* *Es. 63.1-19, Dán. 5.13-30, Sálm. 7*

JAPAN
**Shino og Hallur Mortensen**
**Kano 14, Nana 12, Louie 10, Rio 5**
Í summar hava vit eina dagslegu fyri børnini, ið ganga til enskt. Biðið, at tey hoyra evangeliið, og at vit eisini náa foreldrum teirra.

Útgevari KBS (Kristniboðssambandið)
Blaðnevnd Róland í Skorini, ábyrgd, Ernst Olsen, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Dóra D. Gaard, Kristianna J. Heinesen, Óli Jákup Jacobsen, Jónvør Christiansen, Durita Olsen, Barbara og Ragnar Vest, Hanna og Sigurð Ó. Vang.
Avgreiðsla Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057
Uppseting Grafikmaster, tel. 502022
Myndasavn info@grafikmaster.fo
Prent Føroyaprent, tel. 314555
Teldupostur prayerservicefo@gmail.com
Heimasíða www.kbs.fo

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705

©KBS. Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.

## BÓKATÆNASTAN

Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum og Logos Hope!

## NÝGGJ BÓK!

**365 síður 250 kr.**

Talurnar í bókini viðgera týdningin av umsorgan okkara fyri samkomuni. Harrin hevur knýtt Seg at samkomu Síni, og tænasta okkara, hvør hon enn er, má altíð endurspegla hetta. Eitt nú verða *vápn samkomunnar* viðgjørd við støði í Efesusbrævinum. Bókin er í fimm pørtum.




FORLAGIÐ LEIRKERIÐ

Bílegging á www.leirkerid.fo
Kráargøta 36 • Klaksvík
Tel. 718191 • leirkerid@leirkerid.fo